# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit hava biðið PKK leggja vápnini. Vilja teir ikki tað, mugu teir fara úr Irak at útinna sín gerning*

*(irakski forsetin Jalal Talabani)*

# Tey víðgongdu fingu sekkin

**Teir víðgongdu høgraflokkarnir í Póllandi fingu ein so dyggan frammaná á valinum í gjár, at teir ruku úr tjóðartinginum**




*Donald Tusk verður nýggjur forsætisráðharri í Póllandi*

*(Mynd: Polfoto)*

Jaroslaw Kaczyski, forsætisráðharri, noyddist í gjárkvøldi at ásanna, at stjórnarsamgonga hansara hevði tapt valið, og at eitt stjórnarskifti var á veg.

Persónliga kundi forsætisráðharrin ugga seg við, at hansara egni flokkur, PiS, fekk 31 prosent av atkvøðunum og sostatt fýra prosentstig í framgongd. Men trupulleiki hansara var, at teir báðir víðgongdu stuðulsflokkarnir fingu ein so dyggan frammaná, at teir mistu øll síni umboð á tingi. Á seinasta vali fingu teir báðir flokkarnir ávikavist 11 og 8 prosent, men í gjár fingu teir minni enn eitt prosent í part.

Tann stóri sigursharrin var tann frælslynti flokkurin, sum fekk 44 prosent av atkvøðunum. Tað gevur flokkinum 227 av teimum 460 tinglimunum, og sostatt vantar flokkinum bara fýra tinglimir í at hava meiriluta einsamallur. Men flokkurin hevur tryggjað sær stuðul frá bóndaflokkinum, sum fekk 27 tinglimir, og sostatt hevur tann frælslynti floksformaðurin, Donald Tusk, tryggjað sær tryggan meiriluta í tinginum.

## Nærri Evropa

Hinvegin er einki at ivast í, at tann nýggi forsætisráðharrin kann fáa trupullerikar við forsetanum, Lech Kaczynski, sum longu hevur lovað at órógva arbeiðið hjá tí nýggja stjórnarleiðaranum. Men forsetin sleppur ikki at gera, sum honum lystir, tí Vinstrasamgongan hevur lovað at stuðla stjórnini ímóti forsetanum, og við atkvøðunum hjá Vinstrasamgonguni hevur stjórnarsamgongan nóg nógvar atkvøður fyri at seta sýtingarrættin hjá forsetanum til viks, skrivar NTB.

Í ES varð bíðað við spenningi eftir valinum í Póllandi. Kaczynski-brøðurnir hava verið tungir hjá ES at dansa við, men ein talsmaður fyri Donald Tusk segði í gjárkvøldið, at tann nýggja stjórnin fer at føra Pólland aftur í hjartað í Evropa, sum hann málbar seg.

# Gerry McCann aftur til arbeiðis

**Gerry McCann hevur havt farloyvi, síðani dótturin Madeleine hvarv, men nú vil hann sleppa aftur til arbeiðis sum skurðlækni**



*Gerry McCann fer nú aftur at arbeiða sum hjartaskurðlækni*

*(Mynd: Polfoto)*

Hóast hann framvegis er undir illgruna í málinum um Madeleine, ætlar Gerry McCann sær aftur til arbeiðis nú. Síðani fyrst í mai hevur hann havt farloyvi frá starvinum sum hjartaskurðlækni, men eftir at hava tingast við leiðsluna á sjúkrahúsinum hevur hann gjørt av at byrja aftur, skrivar blaðið Sunday Express.

Leiðslan á Glenfield-sjúkrahúsinum í Leicester sigur við blaðið, ay Gerry McCann er vælkomin aftur til arbeiðis, men sambært blaðnum eru tað ikki øll, sum halda, at avgerðin er rætt. Tey vísa á, at maðurin er framvegis undir illgruna í málinum um Madeleine, og tað kann hava við sær, at summir sjúklingar fara at aftra seg við at tosa við hann, skrivar blaðið.

Leiðslan á Glenfield-sjúkrahúsinum hevur sett ymisk trygdartiltøk í verk í sambandi við, at Gerry McCann kemur aftur til arbeiðis, og tey seinastu tiltøkini komu í gildi leygardagin. Tað er ikki heilt greitt, nær Gerry McCann byrjar aftur á sjúkrahúsinum, men sum skilst sleppur hann ikki at gera størri hjartaskurðviðgerðir teir báðar fyrstu mánaðarnar.

## STUTT SAGT

### Aalborg rúsevnamiðstøð

Fólk, sum dagliga arbeiða í rúsevnaumhvørvinum í Aalborg, siga, at í veruleikanum er býurin eitt slag av einari miðstøð fyri handli við rúsevnum. TV2-Nord visti at siga um vikuskiftið, at nógv fólk koma úr øðrum pørtum av Danmark til Aalborg at keypa amfetamin og onnur rúsevni, tí tey eru bíligari har enn aðrastaðni. Løgreglan í Aalborg sigur seg vera vitandi um, at fólk úr øðrum býum koma til Aalborg at keypa rúsevni, men hon hevur ikki varhugan av, at rúsevnið er bíligari har enn í øðrum býum.

### Vetrarveður

Køld luft av landnyrðingi hevur havt við sær, at tað hevur verið rættiliga kølið nógvastaðni inni á evropeiska meginlandinum um vikuskiftið. Í Kekkia, Eysturríki og Týsklandi fór hitin niður um frostmarkið í 600 metra hædd, og tað kavaði nógvastaðni. Serliga har suðuri í Týsklandi hava fólk fingið greið tekin um, at veturin stendur fyri durum. Leygarnáttina fór tað at kava nógvastaðni í Bayern, og á München-leiðini var alt hvítt leygardagin. Á tí hægsta fjallinum í Týsklandi, Zugspitze, var kavin 80 centimetrar tjúkkur.

### Kvinna lá 19 tímar í sjónum

Ein amerikonsk kvinna varð bjargað í øllum góðum um vikuskiftið, eftir at hon hevði verið 19 tímar í sjónum uttan fyri Manui á Hawaiioyggjunum. Kvinnan var farin eina ferð við kajakk, men ein hvirla holvdi kajakkina, so kvinnan endaði í sjónum. Har var hon so heppin at fáa fatur á einum vatndunki, og við honum helt hon sær flótandi, til eitt fiskifar kom fram á hana. Kvinnan greiddi frá, at hon hevði roynt at fáa kajakkina aftur á rættkjøl, men til fánýtis.